




## *Kristian í Stóru-stovu* (48), Toftir

**Sigur navnið Grønidammur tær nakað?**
– Ja, navnið sigur mær ógvuliga nógv. Grønidammur var ein hylur, sum lá Yviri við Strond, har vit smádreingir plagdu at spæla. Hylurin lá beint sunnanfyri húsini hjá radioamatørunum. Hylurin forsvann, eftir at grivið varð út fyri Eysturskúlanum. Tá koyrdi Tórshavnar kommuna bæði grót og mold á Buckvald. Í einum uppgangi skolaði alt upp á land aftur og oyðilegði stóran part av fjørðuni har um leiðir. Flestu hyljar, sum vóru har, blivu burtur – eisini Grønidammur.

**Heldur tú, tað er vert at grava Grønadamm undan aftur?**
– Ja, eg haldi, tað er ógvuliga umráðandi. Hylurin hevði verið góður, so børn kundi sæð, hvussu henda fjøran tá sá út. Eg minnist væl, at Jens Petur Gaard, lærari, plagdi at taka okkum við sær oman í fjøruna. Í Grønadammi vóru kombikk, krabbar, állar, ulkur – og onkur rækja sást eisini. Hetta hevði verið stuttligt hjá børnunum í dag!

**Hvør eigur at taka stigið at fáa Grønadamm undan kavi aftur?**
– Tað má vera Tórshavnar kommuna, og eg havi orðað hetta bæði við borgarstjóran, Heðin Mortensen og býargartnaran, Tórð í Hoyvík. Eg vóni, at kommunan fer undir at reinsa fjøruna Yviri við Strond og fær Grønadamm undan aftur, sigur Kristian í Stórustovu.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Tambarar




Fíggjarlógarviðgerðin

## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av eystri og sólglottar, men kanska sirm viðhvørt. Hitin millum 12 og 15 stig.

## SUNNUDAGIN




Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 956 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til Bretsku Oyggjarnar kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Estlandi stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Ísland fer spakuliga norðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. okt. | 05:39 | 18:03 | 04:39 | 17:03 | 04:54 | 17:18 | 07:39 | 20:03 | 08:39 | 21:03 | 03:54 | 16:18 | 02:54 | 15:18 | 05:54 | 18:18 | 06:54 | 19:18 | 05:24 | 17:48 | 06:39 | 19:03 |
| 7. okt. | 06:28 | 18:54 | 05:28 | 17:54 | 05:43 | 18:09 | 08:28 | 20:54 | 09:28 | 21:54 | 04:43 | 17:09 | 03:43 | 16:09 | 06:43 | 19:09 | 07:43 | 20:09 | 06:13 | 18:39 | 07:28 | 19:54 |
| 8. okt. | 07:20 | 19:47 | 06:20 | 18:47 | 06:35 | 19:02 | 09:20 | 21:47 | 10:20 | 22:47 | 05:35 | 18:02 | 04:35 | 17:02 | 07:35 | 20:02 | 08:35 | 21:02 | 07:05 | 19:32 | 08:20 | 20:47 |
| 9. okt. | 08:14 | 20:41 | 07:14 | 19:41 | 07:29 | 19:56 | 10:14 | 22:41 | 11:14 | 23:41 | 06:29 | 18:56 | 05:29 | 17:56 | 08:29 | 20:56 | 09:29 | 21:56 | 07:59 | 20:26 | 09:14 | 21:41 |
| 10. okt. | 09:09 | 21:37 | 08:09 | 20:37 | 08:24 | 20:52 | 11:09 | 23:37 | - | 12:09 | 07:24 | 19:52 | 06:24 | 18:52 | 09:24 | 21:52 | 10:24 | 22:52 | 08:54 | 21:22 | 10:09 | 22:37 |